# Føroya Landsskjalasavn
## - nýggj savnshús

Tilmæli til landsstýrismannin
í mentanarmálum

# Føroya Landsskjalasavn
# -nýggj savnshús

♦

## Tilmæli til landsstýrismannin
## í mentanarmálum

♦

Arbeiðsbólkur settur 3. februar 1997

Tórshavn juli 1997

# Innihald


| | Síða |
|---|---|
| Inngangur | 3 |
| Tøku grundøkini í Tórshavn | 3 |
| Tilmæli | 4 |
| Støðið undir tilmælinum | 4 |
| Samstarv og samskifti við aðrar stovnar | 6 |
| Verandi og komandi plásstørvur | 6 |
| Skjal 1. Viðmerkingar til tilmælið | 8 |
| Skjal 2. Hølistørvurin | 11 |
| Skjal 3. Framskriving av goymslutørvi | 12 |
| Kortskitsa 1 | 14 |
| Kortskitsa 2 | 15 |

# Føroya Landsskjalasavn
# - nýggj savnhús

## Inngangur
Tann 3. Februar 1997 setti Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, ein arbeiðsbólk at gera tilmæli um bygging av nýggjum landsskjalasavni. Bakstøðið fyri avgerðini var játtanin uppá 1 mill. kr. á løgtingsfíggjarlógini 1997 til nýtt Landsskjalasavn. Í arbeiðsbólkin vórðu valdir Ole Jensen, arkitektur (skrivari), Jákup Thorsteinsson, stjóri, dr. phil. og Jóannes Dalsgaard, landsskjalavørður, Ph.D.(formaður).

Bólkurin skuldi lýsa hesi viðurskifti:

**1.** Hvørji grundøki kunnu fáast í Tórshavn til endamálið?
**2.** Hvat av hesum økjum er best hóskandi til bygging av skjalasavni við atliti at:
- varðveitingarumstøðum
- virksemi og uppgávum savnins
- brúkarum
- framtíðar menningarmøguleikum
- samskifti og samstarvi við aðrar mentanarstovnar

**3.** Hvussu kann verandi og komandi plásstørvur skjalasavnsins loysast á mest rationella hátt?
**4.** Hvussu skal projekteringsspurningurin best greiðast?
**5.** Hvussu kann byggimálið, sæð út frá einum heildarsjónarmiði best greiðast?"

## Tøku grundøkini í Tórshavn
Arbeiðsbólkurin hevur kannað møguleikarnar fyri grundøkjum í Tórshavn, ið kunnu metast at vera hóskandi til endamálið - nýggj savnshús til Føroya Landsskjalasavn við teimum treytum, ið eru settar í arbeiðssetninginum.

Tey grundøki, ið sambært Tórshavnar býráð eru tøk til endmálið, eru hesi (sí hjáløgdu kortskitsu nr. 1):

**1.** Eitt øki í ætlaða mistaðarøkinum við Føroya Handilssskúla.
**2.** Eitt øki í Marknagili, sum býráðið hevur lagt av til Fróðskaparsetur Føroya.
**3.** Eitt øki við Heygsvegin
**4.** Eitt øki við R.C. Effersøesgøtu og
**5.** Eitt øki við Norðara Ringveg

## Tilmæli

Við støði í arbeiðssetninginum og tí, ið verður ført fram í hesum áliti, skal arbeiðsbólkurin loyva sær at geva landstýrismanninum fylgjandi tilmæli:

- At taka samband upp við Tórshavnar Kommunu við tí endamáli at ogna landsstýrinum økið við Norðari Ringvegi (matr. nr. 1408a, 1409, 1410d, 1396 og part av 1395, sí kortskitsu nr. 2 - øll øki eru ognir hjá Tórshavnar Kommunu) til nýggj savnshús.

- At taka avgerð um at skriva út arkitektakapping um projekt til nýtt Landsskjalasavn á hesum øki.

- At áleggja arbeiðsbólkinum sum skjótast at fara undir fyrireikingar av arkitektakapping um projekt til nýggja Landsskjalasavnið.

## Støðið undir tilmælinum

Landsskjalasavnið skal lúka tey krøv og røkja tær uppgávur, ið eru áløgd savninum við løgtingslóg nr. 49 frá 28.04.1992, um Føroya Landsskjalasavn og við avtaluni frá 1990 við donsku stjórnina. Stovnurin eigur sostatt at hava neyðugar og hóskandi karmar - fysiskar eins og fíggjarligar.

Landsskjalasavnið er ein sermerktur almennur stovnur, ið krevur serstøk fyrilit fyri trygleika og virksemi. Savnið goymir tann partin av okkara mentanararvi, ið almenn skjøl umboða. Varðveitslan av almennum skjølum er ikki bert góður og neyðugur mentanarpolitikkur, men trygg varðveitsla er eisini neyðug, fyri at almenna fyrisitingin og dómsvaldið kunnu virka. Afturat hesum kemur, at varðveitslan av almennum skjølum er av stórum týdningi fyri rættartrygd borgaranna. Almenna skjalasavnið er sostatt samfelagsins minni. Av hesum orsøkum byggja flestu tjóðir trygg og bærilig savnshús.

Savnshúsini eiga at hava goymslur, ið lúka altjóða trygdarkrøv, samstundis sum húsini skulu vera væl hóskandi til vanligt savnsvirksemi og til tær mongu og fjølbroyttu tænastuveitingar, ið savnið røkir mótvegis almennum stovnum, almenninginum og granskingini. Í hesum sambandi eigur at verða havt í huga, at tað er umráðandi, at almennu savnindini eru lætt atgongd hjá brúkarunum.

Landsstýrið hevur við avtalu frá 1990 bundið seg til at varðveita skjølini hjá donskum ríkisstovnum í Føroyum undir tryggum umstøðum á landsskjalasavninum. Hesar treytir lýkur stovnurin ikki, sum er (sí skjal 1).

Arbeiðsbólkurin hevur kannað verandi viðurskifti á Landsskjalasavninum og savnsviðurskiftini aðrastaðni.

Byggiætlaninar frá 1987 (projektið hjá A-plan), har nýggja Landsskjalasavnið var lagt á Mullerstrøð/Debesartrøð, vórðu steðgaðar við tí grundgeving, at har gjørdist ov trongt.

Arbeiðsbólkurin er komin til somu niðurstøðu, at pláss er ikki á Debesartrøð til ein bygning, ið lýkur tey krøv, ið verða sett Landsskjalasavninum og tess virksemi. Aðrir stovnar eru á Debesartrøð, ið hava tørv á nógv meiri plássi, enn teir hava í dag.

Saman við býararkitektinum hjá Tórshavnar Kommunu hevur arbeiðsbólkurin valt út grundøki í Tórshavn, sum kunnu haldast at vera hóskandi til nýtt Landsskjalasavn.

Arbeiðsbólkurin hevur kannað grundøkini, og bólkurin hevur umrøtt og kannað teir møguleikar og tær avmarkingar, ið eru galdandi fyri hvørt grundøki sær.

## Best hóskandi grundøkið

Bólkurin heldur, at best egnaði grundøkið er omanfyrinevnda øki við Ringvegin. Hetta grundøkið nøktar at kalla øll krøv, sum kunnu setast til endamálið:[1]

- Økið liggur við ein týðandi komuveg til høvuðsstaðin og hartil rættiliga centralt.

- Grundøkið er sera lætt at koma til og frá bæði fyri privata og almenna ferðslu frá ymiskum býarpørtum eins væl og uttabýggja.

- Landsskjalasavnið er ein landsdekkandi stovnur og fer á hesum staðnum at gerast granni til aðrar landsdekkandi stovnar, Útvarpshúsið og Norðurlandahúsið, mentanarstovnar eins og Landsskjalasavnið.

- Stovnarnir kunnu nýta hentleikar av ymsum slag hvør hjá øðrum eitt nú í sambandi við ráðstevnur og framsýningar.

- Hetta er eitt bæriligt og sømiligt pláss fyri ein mentanarstovn sum Landsskjalasavnið og sæð frá einum arkitektoniskum sjónarmiði sera áhugavert og avbjóðandi.

Tað eigur í hesum sambandi at vera havt í huga, at landsskjalasavnið kemur at hýsa mentanarligum dýrgripum, ið eiga at verða varðveittir fyri alla tíð. Hesir gripir eiga at kunna verða sýndir fram fyri almeninginum, eins og pláss eigur at verða fyri savnspedagogiskum virksemi í sambandi við framsýningarnar.

Grundøkið og bygningurin eiga at hóska til alt virksemið í húsinum - frá tryggum goymslum til gransking, formidling av søgu okkara, sum er dokumenterað í handritum og skjølum, umframt tænastuveitingar til viðskiftafólk og almennar stovnar. Savnið eigur at verða eitt tekin um um ein virknan og livandi mentanarpolitikk, ið tekur ábyrgd av mentanararvinum. Á hendan hátt fara stovnur og bygningur at styrkja um okkara samleika sum tjóð eins og hann verður ein partur av okkara andliti mótvegis umheiminum. Soleiðis koma vit eins og aðrar tjóðir at nýta savnið í einum tjóðskaparligum og mentanarligum uppbyggingarpolitikki (nation building).

---

[1] Gjørt verður vart við, at tilmælið um hetta økið er treytað av, at neyðturviligar broytingarverða gjørdar á vegaleggingina (sí kortskitsu nr. 2).

### Onnur grundøki

Sum longu nevnt heldur bólkurin eisini onnur tøk grundøki vera nýtilig til endamálið, serstakliga er hetta galdandi fyri økið við R.C. Effersøesgøtu og í miðstaðarøkinum við Marknagilsvegin. Hesi bæði øki lúka tey krøv, ið bólkurin hevur sett til grundøki hjá einum framtíðar landsskjalasavni.

## Samstarv og samskifti við aðrar stovnar

Arbeiðsbólkurin hevur samsvarandi setninginum kannað samstarvsmøguleikar við aðrar mentanarstovnar og hevur í hesum sambandi havt fundir við umboð fyri Føroya Fornminnisavn, Føroya Landsbókasavn, Náttúrugripasavnið og Listasavnið.

Niðurstøðan av umrøðunum av samstarvsmøguleikunum varð hendan:

♦Tørvur er á einum miðdepli til varðveitingarverkstað og til varðveitingar- og savnshentleikar (til kanningar, konservering, restaurering, frystirúm o.s.fr.), har allir nevndu stovnar kunnu lata varðveitingar og endurbøtingararbeiði gera.

♦ Tað er tørvur á goymslu- og varðveitingarplássi, ið øll søvn kunnu nýta til goymslur.

♦ Ásannað varð, at tørvur er á plássi og hentleikum, har stovnarnir eitt nú kunnu fyrireika og gera framsýningar, goyma framsýningarútgerð og hava savnspedagokiskan verkstað.

♦ Tað var hildið at vera skilagott at loysa hendan átroðkandi spurning í sambandi við gerð av nýggjum landsskjalasavni, men støða varð ikki tikin til rakstur og umsiting av einum slíkum felags hentleika sum hesum, ið her er nevndur.

## Verandi og komandi plásstørvur

Í arbeiðssetninginum verður undir punkti 3 álagt bólkinum at koma við tilmæli um mest rationellu loysn á verandi og komandi plásstørvi. Arbeiðsbólkurin hevur kannað verandi plásstørv og komandi tørvin og hevur lýst úrslitini av kanningini í skjølunum 2 og 3.

Sambært kanningarúrslitunum er aktuelli tørvurin á goymsluplássi 1286 fermetrar og tørvurin á plássi til skrivstovur, lesistovur, móttøku, arbeiðsrúm, konserveringsverkstaði, tøkni, fyrilestrarstovu o.ø. 1000 fermetrar.

Samlaði hølistørvurin pr. 1.1.1998 er sostatt 2286 fermetrar.

Arbeiðsbólkurin hevur framskrivað goymsluplásstørvin fram til ár 2008. Framskrivingin er gjørd undir tí fortreyt, at gongdin innan skiftið til KT-tøkni (IT-teknologi) innan almenna fyrsiting verður at kalla hin sama sum eitt nú í Danmark. Hetta merkir, at elektronisk arkivering kemur í staðin fyri pappírsarkivering, og at henda gongd er at kalla fullfiggjað umleið ár 2008. Við støði í hesari framskriving er arbeiðsbólkurin komin til ta niðurstøðu, at árligi vøksturin í goymslutørvi eftir ár 2008 bert verður ein fermetur móti eitt nú 16,7 fermetrar í 1997.

Við støði í uppgjørda aktuella goymslutørvinum, framskrivaða tørvinum til ár 2008 og teimum royndum, ið onnur almenn skjalasøvn í Norðanlondum, hava gjørt, mælir arbeiðsbólkurin til, at landsstýrið letur projektera og byggja eini savnshús 2400 fermetrar til støddar og at loysa projekteringsspurningin við eini arkitektakapping. Víst verður annars til, tað, ið er sagt aðrastaðir í hesum álitið um byggimálið og grundøkini. Sí eisini tað, ið verður skrivað undir partinum “Samstarv og samskifti við aðrar stovnar” á síðu 5.

Um nýggju savnshúsini eisini skulu hýsa tí í tekstinum nevnda miðdepli fyri konserverings-goymslu og framsýningarvirksemi hjá øllum søvnunum, má verða lagt upp fyri hesum. Tað ber ikki arbeiðsbólkinum til at siga við vissu, hvussu nógvum fermetrum tørvur er á, men ætlandi verður talan um einar 600 fermetrar.

**Skjal 1**

# Viðmerkingar til tilmælið

## Føroya Landsskjalasavn - stutt um lógargrundarlag og endamál[2]

Landsskjalasavnið hevur sambært lóg og kunngerðir til *endamáls:*

- *at tryggja varðveitingina av savnindum (skjølum), ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar,*

- *at gera tað møguligt at vraka savnindi, ið ikki eiga at verða varðveitt,*

- *at hava savnindi tøk hjá myndugleikum og almenningi og*

- *at inna gransking í tilknýti til søvnini.*

## Føroyskt tjóðskjalasavn og danskt fyrisitingarligt savn

Tað er sermerkt fyri Landsskjalasavnið, at tað, umframt at vera føroyskt tjóðskjalasavn, eisini røkir eina stóra fyrisitingarliga- og varðveitingaruppgávu fyri donsku ríkismyndugleikarnar. Allir danskir ríkisstovnar uttan hernaðarligir stovnar hava sambært avtalu 1990 millum landsstýrið og ríkisstýrið avhendingarskyldu til Føroya landsskjalasavn. Orsakirnar til hesa støðu eru sovæl fyrisitingarligar sum mentanarligar. Savnindi hjá almennum stovnum, uttan mun til um teir eru lands- ella ríkisstovnar eru tær mest týðandi keldurnar til føroyska søgu sum heild, búskaparsøgu, siðsøgu, mentan, samfelagsviðurskifti og í stóran mun eisini náttúruviðurskifti.

## Løgtingið bjargar skjølunum í 1903

Tá ríkismynduglerikarnir um aldamótið 1900 ætlaðu at flyta skjølini hjá donsku ríksstovnunum til Danmarkar at varðveita á almennum skjalasøvnum har, mótmælti Føroya løgting. Mótmælið var júst orðað við støði í fyrisitingarligum og mentanarligum fyrilitum. Skjølini vóru, hóast ogn hjá danska statinum, ein partur av føroyskum mentanararvi. Donsku myndugleikarnir eftirlíkaðu løgtinginum, og flytingin varð steðgað. Tó eru tey savnindi, ið longu vóru send av landinum, ongantíð komin aftur til Føroya, men landsstýrismaðurin í mentanarmálum og danska mentamálaráðið hava sett

---

2 Endamál og uppgávur landsskjalasavnins eru ásett í *Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992, Landsstýrisins Kunngerð nr. 117 frá 5. juli 1995, Landsskjalasavnsins Kunngerð nr. 1 frá 25. juli 1995 og Avtalu millum donsku stjórnina og landsstýrið frá 30. mars og 12.oktober 1990 um skjalasøvn hjá stovnum ríkisins í Føroyum.* Sambært avtaluna verða skjalasøvnini hjá ríkisstovnum umsitin eftir donskum reglum og tí galda ásetingarnar í *Lov nr. 337 af 14. maj 1992 om offentlige arkiver m. v. og Kulturministeriets bekendtgørelse nr. 878 af 21. oktober 1992 om offentlige arkivalier og om offentlige arkivers virksomhed* fyri hesi søvn. Stovnurin umsitur sostatt bæði føroyska og danska lóggávu og hevur sama myndugleika mótvegis donskum ríkisstovnum í Føroyum, sum *Statens Arkiver* hava mótvegis almennum stovnum í Danmark. Almennir stovnar hava skyldu at avhenda landsskjalasavninum savnindi (bøkur, skjøl, disklar, bond, kort, myndir v.m.) teirra, tá hesi eru 30 ára gomul. Savnindi kunnu bert verða vrakað (fyribeind) við loyvi frá landsskjalasavninum. Herumframt hevur landsskjalasavnið lógásetta skyldu at tryggja privat skjøl, ið verða hildin at hava stóran granskingarligan ella mentanarligan týdning. Eisini hevur landsskjalasavnið eftir lógini skyldu at inna gransking í tilknýti til søvn tess.

embætismannanevnd at samráðast um hendan spurning, og alt bendir á, at skjølini kunnu verða flutt aftur til Føroya, um skjalasavnshúsini í Føroyum lúka vanlig trygdarkrøv.

Sama embætismannanevnd arbeiðir við spurninginum um at flyta onnur skjøl og handrit av serstøkum týdningi fyri føroyska mentan í ávísum almennum donskum søvnum til Føroya og tykjast útlitini fyri einum góðum úrsliti at vera góð, tó er hetta treytað av tryggum varðveitingarumstøðum í Føroyum.

## Royndir at byggja savnshús

Ein fylgja av, at løgtingið hevði steðgað flytingini av skjølunum, var, at løgtingið fleiri ferðir í tíðarskeiðinum 1903 til 1925 royndi at fáa donsku ríkismyndugleikarnar at byggja, ella at vera við til at byggja, landsskjalasavn í Føroyum.

Í 1927 segði stjórnin seg at vera sinnaða at fara undir byggingina, tá ið tíðirnar fóru at gerast betri og árið eftir samtykti løgtingið at játta 20.000 kr. til byggingina, treytað av, at ríkismyndugleikarnir játtaðu somu upphædd. Í 1929 játtaðu donsku myndugleikarnir hesa upphædd og arbeiðið at byggja hús til bókasavn, skjalasavn og fornminnissavn á Debesartrøð byrjaði sama ár. Tann 3. Mai 1931 vórðu savnshúsini á Debesartrøð vígd og kostaðu tey tá 80.000 kr. Tær 40.000 kr., ið írestaðu, lántu myndugleikarnir frá Universitetskvæsturinum.

## Savnshúsini (steinhúsini á Debestartrøð) ov smá frá fyrsta degi

Nýggju húsini á Debesartrøð vóru ov smá at kalla frá fyrsta degi, og farið var skjótt undir at leiga goymslur. Hetta var ikki bert óhent sæð frá einum varðveitingarsjónarmiði, men hetta gjørdi eisini, at savnið ikki fekk lagt avhendingarskipanina í eina fasta og planlagda legu.

Í 1964 keypti landsstýrið Mullerstrøð til savnshús, og í 1965 varð farið undir at detajlprojektera nýtt landsbóka- og skjalasavn á matr. Nr. 1025a í Havn.[3] Í 1966 legði landsstýrið uppskot um nýtt landsbóka-og skjalasavn við detajlprojekti fyri løgtingið, men uppskotið fall, samstundis sum uppskot um at byggi landsbókasavn einsamall varð samtykt.[4]

Í 1972 avgjørdu landsstýrið og løgtingið, at Landsskjalasavnið skuldi flyta í kjallaran á Heilsufrøðilgu starvstovuni, ið var í gerð. Hetta varð gjørt, men hetta loysti als ikki hølistrupulleikar savnsins, tí framvegis tørvaði nógv goymslu- og skrivstovupláss.

Síðan 1985 hava árliga verið settar peningaupphæddir av til bygging av nýggjum Landsskjalasavni. Í grunninum vóru pr. 31. 12.1996 uml. 9 mill. Kr., men nú er grunnurin avtikin við løgtingslóg nr. 94 frá 6. Juni 1997. Á heysti 1987 gav landsstýrið loyvi til projektering av nýggjum landsskjalasavni á Mullerstrøð, og á vári 1988 gav løgtingið landsstýrinum heimild at lána upp til 11 mill. Kr. til fígging.[5]

---

[3] Løgtingsmál nr. 64/1965

[4] Løgtingsmál nr. 31/1966.

[5] Løgtingslóg nr. 58 frá 9. Juni 1988.

Í mars 1989 var projekteringin steðgað eftir ynski frá Tórshavnar býráð, ið vildi hava savnshúsini bygd uttan fyri Debesartrøð-økið. Býráðið hevur síðan víst á onnur byggiøki.

Eftir at mentanarálitið, ið var orðað eftir boðum frá Sámali Peturi í Grund, landstýrismanni, varð vorðið almannakunngjørt, kom gongd aftur á málið um nýtt Landsskjalasavn. Á løgtingsfíggjarlógina vórðu eftir uppskoti frá mentanardeildini settar 1 mill. kr. til fyrireiking og projektering.

Tann 3. Februar 1997 setti Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, arbeiðsbólkin at gera uppskot til tilmæli um loysn av hølisspurninginum hjá landsskjalasavninum (sí frammanfyri).

Skjal 2

# Hølistørvurin hjá Føroya Landsskjalasavni ávikavist pr. 1.1.1998 og pr. 31.12.2008

Eftir bestu sannføring, ið byggir á ítøkiligar uppmátingar, upplýsingar frá stovnum og framskrivingar er arbeiðsbólkurin komin fram til ein hølistørv sum lýst í niðanfyristandandi talvu:

| Savnindi úti á stovnum | Hillam | Ferm |
|---|---|---|
| Landsstovnar | 6300 | |
| Ríkisstovnar | 805 | |
| Kommunur og kommunalir stovnar | 2023 | |
| Hálvalmennir stovnar[6] | 1288 | |
| Privat søvn[7] | 1000 | |
| Óvist | 1142 | |
| Tilsamans úti á almennum stovnum pr. 1.1.1998 | 12558 | |
| Landsskjalasavnið, verandi søvn | 2873 | |
| Samlaður goymslutørvur pr. 1.1.1998[8] | 15431 | 1286 |
| Skrivstovur, lesistovur, móttøka, arbeiðsrúm, verkstaður, tøkni, fyrilestrarsalur, edv, v.m. | | 1000 |
| Samlaður hølistørvur pr. 1.1.1998 | | 2286 |
| Savnindaøking til ár 2008 samb. framskrivingar[9] | 1360 | 113 |
| Hølistørvur pr. 31.12.2008 samb. framskrivingar | | 2399 |

Heimildir: L.S. j.mál.3.2/93

[6] Avhendingarskyldugir eftir lógini frá 1992 t.d. Tryggingin, Strandferðslan, TFL etc.

[7] Meting.

[8] Eftir gomlu skipanini varð vanligt at rokna lutfallið millum hillametrar og kvadratmetrar sum 1:10 við compactushillum, men úrslitið av donskum royndum er, at Statens Arkiver nú hava útviklað eina standardgoymslu við lutfallinum 1:12. Hetta merkir, at 15431 hm ikki krevja 1543 kvadratmetrar sum áður, men bert 1286 kvadratmetrar, ella v.ø.o. ein munur uppá 257 kvadratmetrar, ið er ein stór sparing.

[9] Roknað er við somu gongd innan IT sum í Danmark. Hetta merkir, at umleið ár 2008 er øll arkivering vorðin elektronisk og goymslutørvurin sostatt vorðin minimalur í mun til tíðarskeiðið við pappírsarkivering.

**(Skjal 3)**

# Framskriving av goymslutørvi Landsskjalasavnsins - øking til ár 2008

Tær broytingar, ið eru við at henda innan almennu umsitingina orsakað av skiftinum frá vanligari skrivstovutøkni til KT-tøkni (IT-teknologi), koma at ávirka nøgdirnar av skjølum, ið verða arkiverað sum pappír. Samfelagið er veg móti tí pappírsleysu almennu skrivstovuni. Henda gongd hevur stóran týdning fyri metingarnar av goymslutørvinum hjá Landsskjalasavninum framyvir. Sum er, líkist gongdin innan almennu fyrisitingina gongdini eitt nú í Danmark, har tað nú gongur rættiliga skjótt við skiftinum frá pappírsarkivering til elektroniska arkivering, hóast tað ikki gongur so skjótt, sum stjórnin upprunaliga hevði ætlað við síni KT-verkætlan frá 1995.[10] Henda gongd hevur havt stóra ávirkan á byggiætlanirnar fyri nýggjum ríkisskjalasavnið í Danmark.

Niðanfyri er yvirlit yvir mettu gongdina í Føroyum. Talan er um eina framskriving við støði í tí meting, at skiftið til elektroniska arkivering fer at henda í sama mun sum í Danmark. Tó so at ferð kemur seinni á gongdina í Føroyum enn í Danmark. Í Danmark hava longu nú fleiri ráðstovur skift til pappírsleysa fyrisiting, har øll mál verða viðgjørd við IT-teldutøkni og øll skjøl verða elektroniskt arkiverað. Í Føroyum eru vit enn á byrjunarstøði, men alt bendir á, at ferð skjótt kemur á skiftið frá umsiting á pappírsstøði til umsiting á teldustøði við IT-tøkni (KT-tøkni). Framskrivingin fevnir bert um tørvin hjá almennum stovnum og byggir á verandi øking uppá 200 m. pr. ár.

Øking av pappírssavnindum fram til ár 2008

| Ár | Árlig øking í hillametrum | Øking í hillametrum samanlagt | Øking í $m^2$ |
|---|---|---|---|
| 1996 | 200 | 200 | 16,7 |
| 1997 | 200 | 400 | 16,7 |
| 1998 | 182 | 582 | 15,2 |
| 1999 | 176 | 758 | 14,7 |
| 2000 | 150 | 908 | 12,5 |
| 2001 | 124 | 1032 | 10,3 |
| 2002 | 100 | 1132 | 8,3 |
| 2003 | 80 | 1212 | 6,7 |
| 2004 | 58 | 1270 | 4,8 |
| 2005 | 38 | 1308 | 3,2 |
| 2006 | 22 | 1330 | 1,8 |
| 2007 | 18 | 1348 | 1,5 |
| 2008 | 12 | 1360 | 1,0 |

[10] Sí Fra vision til handling. Info-samfundet år 2000. Redegørelse til Folketinget om Info-samfundet år 2000 og IT-politisk handlingsplan 1995. Forskningsministeriet. Marts 1995 og Elektronisk arkivering Aktuelle muligheder og anbefalinger. Forskningsministeriet, Kulturministeriet. November 1995.

**Mettur tilvøkstur í hm av pappírssavnindum fram til ár 2008 treytað av at skiftið til elektroniska arkivering fylgir gongdini innan almennu umstingina í Danmark**




Myndilin fyri skiftið frá pappírsarkivering til elektroniska arkivering er eftir donsku framskrivingunum, ið vórðu gjørdar í samband við, at nýtt ríkisskjalasavn verður bygt í Keypmannahavn.[11] Eingin orsøk er at halda, at gongdin verður øðrvísið í Føroyum. Økingin í fermetrum í sambandi við økingina fæst við at nýta danska standardnormin, t.v.s. at býta talið av hillametrum við 12. Samanlagda økingin vil sostatt verða 113,4 $m^2$ í tíðarskeiðinum 1996-2007.

[11] Tað er ikki at tilvild, at gongdin innan donsku fyrisitingina er nýtt sum fyrimynd her. Hinvegin kann verða upplýst, at skiftið frá vanligari pappírsfyrisiting við teldutøkni til pappírsleysa fyrisiting við tí mest framkonu IT-tøkni er komið longur áleiðis í eitt nú Noregi, Schweitz, Finlandi og USA. Lagt kan verða afturat, at tað sum eyðkennir at kalla alla planlegging innan almenna umsiting í Vestureuropa er, at skift verður frá arkivering á pappíri til elekroniska arkivering av flestøllum savnindum, ið verða til í umsitingini.


5
4
2
1
3




| | |
|---|---|
| Matr.nr. 1410 $^{d}$ | 3.511 $m^2$ |
| Matr.nr. 1409 | 3.260 $m^2$ |
| Matr nr. 1408 $^{a}$ | 2.391 $m^2$ |
| Matr.nr. 1396 | 2.397 $m^2$ |
| Partur av matr.nr. 1395 | 2.000 $m^2$ |
| Byggilendi tilsamans | 13.559 $m^2$ |